# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gjógvin

So hevur løgmaður hildið sína fjórðu og seinastu løgmansrøðu í hesum valskeiðnum. Um hann kemur at halda aðrar fýra afturat, vil tíðin vísa. Val verður eftir reglunum í seinasta lagi tann 20 januar 2008, men løgmaður ger ivaleyst klókt í at útksirva val í november. Januar mánaður hóskar ikki væl til at reka valstríð. Valstríðið kemur inn í jólahøgtíðina og órógvar jólafriðin, so løgmaður ger okkum øllum ein beina við at fáa gamla valdagin aftur í hásætið.

Løgmaður tók saman um nøkur av teimum størru málunum, ið samgongan setti sær, tá hon legði frá landi í februar 2004. Sjálvstýrismálið skuldi leggjast í fastan karm, soleiðis at orka aftur kundi brúkast til at betra um viðurskiftini hjá borgarunum og fáa búskapin aftur á rætt kjøl. Hetta metir løgmaður eydnaðist væl, og hetta fegnast hann sum vera man um. Tað er lítið hugsandi, at andstøðan er samd við honum í hesi meting. Løgmaður ger eisini vart við, at nøkur mál enn eru óloyst og lovar her bót og bata. Vit mugu geva honum rætt og kunnu endurtaka tað vit vístu á í gjár, at eitt nú eftirlønarmálið enn ikki er loyst á nøktandi hátt. Víst eru framdar ábøtur, men tann stóri pensjónsreformurin er enn ikki komin á tingborð.

Vælferðin verður tann heilt stóri politiski spurningurin í komandi valskeiði. Løgmaður vísir púra rætt á, at politikkur snýr seg um at skapa vælferð fyri tað einstaka menniskja. Hetta er serliga áleikandi, nú nýggjar tíðir og nýggir møguleikar lættliga kunnu breiðka munandi um gjónna millum tey ríkastu og tey, ið ikki megna at fylgja við. Tað er okkara skylda at tryggja, at hesi ikki detta niður ímillum. Her er ikki hent nóg mikið, og tað er ikki nóg gott, at løgmaður umber seg við, at kjarnuuppgávurnar hava fylt nógv í politiska arbeiðinum – hann hugsar her um framdar batar og nýskapan á skúlaøkinum, almannaøkinum og á heilsuøkinum. Víst hevur hann rætt, og hetta tænir samgonguni til æru, men megnar løgmaður ikki at leggja ein trúverdugan vælferðarpolitikk fram í heyst, so hevur flokkur hansara ein trupulleika. Andstøðan hevur longu gjørt sínar viðmerkingar til røðuna, og sum væntað, hava hesar verið sera kritiskar. Í morgin fer tingið undir at viðgera røðuna. Henda viðgerð má metast at vera sjálvt startskotið til komandi valstríð, og tí verður sera áhugavert at fylgja við, hvat tingfólk og landsstýrisfólk fara at taka fram.

**Sosialurin**

## Virðir Djurholm ikki løgtingssamtyktina?

**Politisku veljarafeløgini í Eysturoynni mótmæla royndunum frá Vinnumálaráðnum at sáða iva um løgtingssamtyktina at samráðast við felagið, sum stendur aftanfyri ætlanina um at gera fast samband undir Tangafirði millum eystara og vestara arm á Skálafjørðinum og Suðurstreym**

*Eysturoyar Fólkafloksfelag*
*Samhald*
*Eysturoyar Javnaðarfelag*
*Eysturoyar Sjálstýrisfelag*
*Eysturoyar Tjóðveldisfelag*
*Miðflokkurin í Eysturoynni*

Í vár legði Bjarni Djurholm uppskot fram á ting um heimild at samráðast um at geva konsessión til gerð av tunli undir Tangafirði. Orsøkin til, at hetta uppskot varð lagt fram, var, at felagið sum í fleiri ár hevur gjørt kanningar og fyrireikað verkætlanina nú var komið so langt áleiðis, at bæði tekniska og fíggjarliga grundarlagið var búgvið at taka støðu til og at farast kundi í gongd á hesum grundarlagi.

**Ongin undirtøka fyri almennari luttøku**
Uppskotið hjá Vinnumálaráðnum bygdi á møguleikan at samráðast við tað eina felagið ella fleiri feløg, um ætlanin bleiv boðin út. Uppskotið staðfesti í viðmerkingunum, at politisk undirtøka ikki var fyri at tað almenna skuldi inn í ætlanina.

**Samráðast skuldi við pf. Skálafjarðartunnilin**
Ein minniluti setti uppskot fram um, at tað bert skuldi vera talan um at bjóða ætlanina út, men tað uppskotið fall (22-8). Meirilutauppskotið um at tað bert skuli samráðast við tað eina felagið – pf. Skálafjarðartunnilin – bleiv viðtikið (22-0). Ongin setti nakað uppskot fram um at tað almenna skuldi inn í ætlanina.

**Tað almenna órógvar ætlanini**
Sostatt skuldi tú hildið, at málið politiskt var avgreitt, men so tykist ikki at vera. Umsitingin hjá Vinnumálaráðnum ella Landsverk hevur frá fyrstan tíð sett løgin uppskot fram, sum bert kunnu hava havt tað til endamál, at órógva tunnilsætlanina.

**Løgin uppskot – hvør hevur umbiðið tey?**
Eitt av løgnu uppskotunum var, at í staðin fyri tunnil millum eystara og vestara armin á Skálafjørðinum skuldi byggjast brúgv. Onkur helt, at tað var eitt projekt, sum sjálvur landsverksfrøðingurin hevði gjørt í síni lestrartíð og tessvegna vildi gera til veruleika. Men undir øllum umstøðum skal eitt brúgv við eini fríhædd upp á 50 m á 40 m dýpi hvíla á stabbum í 90 m hædd!! Við tí vindferð, vit kenna til, høvdu tað verið nógvir dagar, at ein slík brúgv hevði verið stongd.

Nýggjasta løgna uppskotið, sum Landsverk leggur navn til, er, at nú skal Skálafjarðartunnilin gerast av almennum partafelagi og gjalda Sandoyartunnilin. Tað góða í hesum uppskoti er, at Vinnumálaráðið metir tunnilsætlanina at vera so góða, at hon kann fíggja bæði seg sjálva og aðrar tunlar, ja, ennta ein nýggjan flogvøll, bleiv sagt!! Men hetta uppskot hevur neyvan aðra ætlan, enn at órógva arbeiðið, sum er í gongd.

Hví kemur Landsverk fram við hesum uppskoti nú, tá ið tað politiskt er avgreitt og fastlagt, at tað almenna ikki skal vera uppí? Er uppskotið umbiðið av landsstýrismanninum?? Neyvan kann ein almennur stovnur fara at leggja seg út í, um ein verkætlan skal vera almenn ella privat og tað enntá tá ið tað er viðtikið, at tað skal vera privat.

**Politisku feløgini mótmæla**
Politisku veljarafeløgini í Eysturoynni skulu tí við hesum mótmæla øllum royndum frá almennari síðu at leggja fótonglar fyri hesi ætlan, soleiðis at hon verður seinkað ella í versta føri útsett til óásetta tíð.

## Ólavsøkuskrúðgongan hevur mist nógva tign

**ODDVØR JOHANSEN**



Fyrr gekk henda skrúðgonga í tveimum røðum, politikkarar øðrumegin og prestar hinumegin, og síðani vóru tað teir tríggir donsku embætismenninir.

Men mangt broytist.

Speril kom í og stýrisskipanarlógin fekk skyldina. Og fyri at gera øllum til vildar er Ólavsøkuskrúðgongan í dag í trimum røðum. Tó ikki nóg mikið við tí. Nú sleppur hvør Hanus og Janus upp í hesa fyrr so tignarligu gongu, ein herskari av skrivstovukrakkum og enntá innboðin fremmandafólk, sum einki hava at gera í hesi gongu.

Fakta er, at tá ið oddafiskarnir eru komnir upp á pláss inni í kirkjukóri, stendur ein langur hali sum sild í tunnu út eftir øllum kirkjugólvinum – heilt út um dyrnar. Alt er steðgað upp.

Sum gamal urguleikari í hesi kirkju veit eg, at urguleikarin av hesi orsøk verður noyddur at spæla eitt rættiligt maratonpreludium, áðrenn gudstænastan í heila tikið kann byrja.

Sera jánkasligt. Her vantar ein garvaður seremonimeistari.

Fáið tignina aftur í Ólavsøkuskrúðgonguna.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.